Sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkustjóri: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jóstimus L. Eidesgaard - Eyðun Klakkstein - Eiríkur Lindenskov - Áki Bertholdsen

Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 20, Argjum

Postadr.: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news e-mail: sosialur@olivant.fo

Áhugaverd ráðstevna

Oddagrein

Í hesum døgum eru 70 vísindafólk, jarðfrøðingar og jarðalisfrøðingar frá universitetum og oljufeløgum úr 16 ymiskum londum á ráðstevnu í Havn. TAlan er um eina altjóða ráðstevnu, har evnið serliga snýr seg um leguguytislægdir (sedimentbasseng) ymsa staðni í heiminum. Kortini snúgva fleiri av fyrilestrunum seg um nýggjastu kanningar nar av jarðfrøðiligu tilgongdini í Norðuratlantiska økinum kring Føroyar.

NÚ Føroyar tykjast nærkast eini komandi oljuøld er tað serea heppið fyri áhugan og tilvitanina um undirgrund okkara, at tað eydnast at fáa fleiri av fremstu serfrøðingunum og vísindamonnunum á økinum hendavegin at halda fyrilestrar. Hetta at fáa fakfólk á ymsum fakøkjum, sum hava okkara serliga áhuga, at vitja higar, er við til at menna professionella og fakliga umhvørvið her á landi. Nakað, sum er so tiltrongd á nærum øllum hugsandi økjum. Tað gevur okkum íblástur og gevur okkum har við eisini møguleikar betri at ímynda okkum og eisini tilrættaleggja útviklingin á einum ávísum øki, her spurninginum um eina komandi frálandavinnu.

NÚ áhugin frá oljufeløgunum fyri at vera við í leitingini eftir olju og gass á føroyskum øki er støðugt vaksandi, er tað eisini sera avgerandi fyri okkum føroyingar, at vit kunnu taka til okkum alla hugsandi vitan um okkara egna øki. Hetta skal so ráðstevnan á Hotel Føroyum í hesum døgum verða ein hjálp til. Um sama mundið sum henda ráðstevna verður hildin, frætta vit frá oljuráðstevnum í útlandinum, at oljufeløg meta Føroyar sum eina týðandi komandi oljuprovins. Kanningarnar higartil benda á, at stórir møguleikar eru at finna olju og gass her.

TALAN er so ikki bert um at hava eina komandi oljuvinnu fyri eygað. TAð snýr seg eisini um at fáa betri vitan um undirgrundina, nú vit eru í ferð við at samráðast við bretar um ásetan av einum undirgrundarmarki. Her er júst vitan um okkara egnu undirgrund og ta undirgrund, sum vit hava gjørt krav uppá at eiga, av stórum týdningi. Vit hugsa ikki bert um ósemjuna um miðlinjumarkið millum Føroyar og Bretland. Her verður eisini hugsað um tey stóru økini sunnan fyri Føroyar, ið vanlig verða nevnd Rock All og Hatton háslættarnir. Hetta eru ógvuliga stór øki, har vit vita bretar longu hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at útvega sær vísindaligan upplýsingar um undirgrundina, fyri harvið at standa sterkari í samráðingunum við aðrar. Her telur vitan ometaliga nøgv fyri eins samráðingarstøðu, og vit loyva okkum at halda, at krøv breta til stórar partar av tí vit meta er okkara undirgrund, alla tíðina hava bygt á eina veruliga vitan, sum bara teir hava havt og ikki vit. Tað hevur sett teir í eina betri samráðingarstøðu og okkum í eina verri.

AT tað tí nú verður sett fokus á undirgrundina við Føroyar og eisini sunnan fyri kann vónandi verða við til ikki bert at vaksa um okkara tilvit men eisini verða ein góð ballast í samráðingunum við bretar. Í síðsta enda er besta vápnið og trumfurin eitt nú í samráðingum vitan og aftur vitan. Oljufyrisitingin og teir, ið hava tikið sær av hesum tiltaki eiga tí rós uppiborið fyri at hava fingið hetta tiltak í lag. Vónandi kann tað vera katalysatorurin til at økja um áhugan og her ikki minst vísindaliga áhugan fyri øllum undirgrundarøkinum um okkara leiðir í Norðuratlantshavi.

VIT ynskja bæði útlendingum og føroyingum eina góða ráðstevna og vóna, at hon kann vera við til at menna tilvitanstøði okkara í hesum stóra máli. Vónandi kann hetta eisini vera við til at skapa eitt enn størri og breiðari vísindaligt og fakligt miljø her á klettunum – nú so nógv bendir á, at ríkidømi finst í somu undirgrund. Bæði fyri okkum og komandi ættarlið hevur tað týdning at vitan okkara er nógv, tí tað fer so aftur at gera, at vit sjálvi vera við til at mynda útviklingin. Tað eru vit, ið skulu búleikast her og tí mugu tað eisini vera vit, sum seta í kortið kósina fyri framtíðina. Og tað gera vit best, um vit sjálva hava vitanina.

Sosialurin

Viðmerking

Foreldrini taka undir við broytingum í donskum

Eitt, sum er at stórum týdningi í hesum máli er, at so at siga øll foreldrini taka undir við sjónarmiðunum um, at frægast man vera at byrja við donskum í 4. fl.

Ein skúlaráðslimur hevði eina langa grein í Sosialinum nú ein dagin. Evnið var fólkaskúlin og nýggja fólkaskúlalógin.

Undirritaði noyðist at gera nakrar viðmerkingar til tað, sum verður sagt um málundirvísingina (føroyskt, danskt, enskt).

Enskt

Í greinini verður t.d. sagt, at tað er sjálvsagt, at vit byrja við enskum í 5. fl. í staðin fyri 6. fl. sum nú, og at øll tvaleyst eru samd um hetta. Sjálvur eri eg enskLærari, men eg eri ikki samdur í hvussu so er ikki, fyrr enn broytingar eru gjørdar í donskum.

Annars er ein stór andsøgn í greinini viðvíkjandi tí enska. Fyrst verður sagt, at »vit mugu hava meiri enskt, soleiðis at vit koma at duga málið betur«, men samstundis verður sagt, at »vit sum fáast við ungdóm í skúlunum, kunnu slaa fast, at hóttanin móti okkara móðurmáli kemur *als ikki frá donskum*!«, men frá tí alttevnandi enska málinum«. Sig so tað!

Danskt

(1. fremmandamál okkara)
Greinskrivarin heldur tað vera á góðari leið at byrja við donskum í 3. fl. og sigur, at grannalond okkara fara [illegible] í 4. fl. við enskum. Men góðastu tú! Tað tykist, sum vit hava hug at gloyma, at enskt er 1. fremmandamál í t.d. Danmark, meðan enskt er 2. fremmandamál hjá okkum.

Vit hava jú danskt eisini, við mestsum líka nógvum tímum á tímatalvuni sum føroyskt, so her ber als ikki til at samanbera við grannalondini.

Royndir eru gjørdar

Sagt verður eisini í greinini, at »vit her á landi ikki hava ítøkiligar pedagogiskar royndir at byggja á, tá talan er um spurningin føroyskt/danskt í fólkaskúlanum«.

Jú, ávísar royndir eru gjørdar. Nakrir skúlar hava gjørt royndir við at bíða við donskum til 4. skúlaár. Hesir undangonguskúlar eru Leirvíkar, Kvívíkar og Kollafjarðar skúli. (Kollafjarðar skúli tó við 2 dansktímum í 3. flokki). Onkur annar skúli hevur eisini bíðað við donskum til 4. skúlaár.

Sambært upplýsingum frá Landsskúlafyrisitingini eru ávísir fyrimunir fyri málundirvísingina við at bíða við donskum til 4. skúlaár (Lógið, at so lítið kemur fram um hesar royndir).

Annars skuldi tað verið óneyðugt við kanningum á hesum øki. Fjøldin av Føroya fólki man vera samd um, at tað líkist ongum at oysa 5 dansktímar í høvdið á okkara 9 ára gomlu børnum í 3. flokki. (Føroysk tímarnir eru 6 í tali).

Um vit kortini ikki kunnu semjast um at byrja við donskum í 4. fl., so hevði tað í fyrstu atløgu kanska verið eitt hugskot at havt 2 dansktímar í 3. fl., sum gjørt hevur verið í Kollafirði!!

Donsk ella ensk málávirkan

At greinskrivarin skal fáa seg til at siga, at hóttanin móti føroyskum *als ikki* kemur frá donskum, men harafturímóti frá enskum!!

Hatta kanst tú ikki meina!! Sjálvandi verður mál okkara í ein vissan mun ávirkað av enskum, men tað kann als ikki samanberast við ta øgiligu ávirkan, sum danskt mál hevur havt og framvegis hevur á okkara mál, ikki minst í hesum fjølmiðlatíðum (t.d. næstan bara danskur tekstur í sjónvarpinum).

Lurta eftir málbrúkinum hjá bæði leikum og lærdum, lurta eftir útvarpi og sjónvarpi, hygg í bløðini (allir hesir fjølmiðlar gera annars eitt gott málsligt arbeiði), les føroyskar stílar í skúlunum o.s.fr., danska ávirkanin er týðilig, og sjálvandi er hon tað, sum málsliga støðan hevur verið og framvegis er í Føroyum.

Danskar málkanningar

Einastaðni í greinini verður sagt, at sambært royndum eru fremmandamálini og móðurmálsundirvísingin við til at stimbra hvørt annað, og tí skulu vit byrja tíðliga við fremmandamálum.

Hatta samsvarar ikki við danskar royndarfrágreiðingar, t.d. («Tidligere engelskundervisning 1 og 2» Danmarks Lærerhøjskole 1992). Har stendur m.a. »at tað *ikki* loysir seg at byrja við fremmandamálum niðan fyri 5. flokk, og at undirvísing í fremmandamálum í hvussu so er ikki skal byggja á skrivaðan tekst fyrr enn aftaná 4. fl. so lesiførleikin fær frið at mennast á móðurmálinum, uttan at aðrir tekstir við øðrvísi orðamyndum órkymla.

Sjálvandi skulu vit duga danskt bæði væl og virðiliga, eisini enskt (sjálvur eri eg bæði dansk- og enskLærari), men at vit, sum støðan er nú, í vissum førum tykjast at duga danskt betur enn føroyskt, tað kann ikki góðtakast, um vit hava bert eitt lítið sindur av sjálvsvirðing. Lat okkum heldur ikki gloyma, at fortreytin fyri at duga onnur mál er, at tú dugir títt egna mál til lítar.

Vit, sum halda, at danskt eigur at skerjast í 3. fl., verða í greinini løgd undir at hava m.a. viðgongd tjóðskaparlig sjónarmið, og síðani kemur hin eyðkendi orðafloymurin um, at vit fara at enda sum nalvaskoðandi heimføðingar úti í Norðuratlantshavi, um vit nerta við dansktímarnar. Her man viðmerking vera óneyðug, men eg kundi hugsað mær at spurt, hvat tey verða nevnd, sum framvegis í 1996 íðin verja danskt mál her á landi!!

Í okkara skúla hava vit ein lærara, sum í ár hevur fingið loyvi til at skerja dansktímarnar úr 5 niður í 2 t. í sínum 3. fl. Hann er neyvan tjóðskaparliga viðgongdur.

Samanumtikið kann sigast, at sjálvt um greinin viðger bæði nútíðina og framtíðina, so er hon samstundis, tá talan er um føroyskt/danskt í fólkaskúlanum, ein ávís rødd úr farnari tíð. Spell!

Hvat er okkara móðurmál?

Eg haldi, at vit skulu lurta eftir ráðum frá eini danskari lærarinnu í Føroyum. Hon segði nakað soleiðis í summar: »Føroyingar áttu at fingið skil á, hvat ið veruliga er okkara móðurmál í Føroyum, føroyskt ella danskt«. Væl sagt.

Tvingsilsflyting

Á einum øki eri eg púra samdur við greinskrivaran. Tað er skeivt at tvingsilsflyta framhaldsdeildirnar ella 10. flokkarnar í høvuðsstaðarøkinum.

At enda fari eg at takka greinskrivaranum og hinum, sum hava skrivað um evnið føroyskt/danskt/enskt í fólkaskúlanum. Hetta er eitt størri mál í Føroyum í 1996, enn vit geva okkum far um.

Kanska fer onkur annar eisini at gera vart við seg!!

Vinarliga
Eyðun á Borg, Argir

Lýsingartorgið
nú hvønn dag

Tað rætta lýsingartorgið - bara í Sosialinum FIMM ferðir um vikuna